# Høgni vann gull

**Í seinstu fimleikakappingunum eydnaðist Høgna R. Øster at vinna gull, og so var ævintýrið fullkomið. Eisini Helgi W. Olsen fekk tvey heiðursmerki afturat savninum**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk*

**Scalloway:** Hóast nógvir vinnarar vórðu funnir á oyggjaleikunum, so mundi fáur teirra vera stoltari enn Høgni R. Øster, tá hann fríggadagin vann gull í lopi, tá bundna íðkanin hjá monnum var á skránni.

Eftir at hann fyri knøppum tveimum árum síðani fór í herna móti blóðkrabbanum, sum hótti lívið, var fremsta málið hjá Høgna bara at taka lut aftur á oyggjaleikunum.

Hetta eydnaðist, og tá hann so saman við liðnum vann gull í liðkappingini á gólvinum, var málið væl og virðiliga rokkið. Men ævintýrið endaði ikki við hesum. Við einum lopi, sum gav 7,9 stig, rakk Høgni ovastu tindunum í hesi greinini, og soleiðis kundi hann leggja eitt gullmerki afturat tí, sum hann vann á Man fyri fýra árum síðani.

## Silvur og bronsa til Helga

Eisini Helgi W. Olsen fekk eitt gott hál seinasta dagin. Á gólvinum, har hann annars vann gull í fríu íðkanini mikudagin, fekk Høgni silvur hesaferð. Og tó at hann heilkiksaði í lopinum, har hann varð nummar 14, so gjørdist hann triði besti íðkarin samanlagt, og fekk soleiðis eitt bronsumerki í samlaðu kappingini.



*Við gullmerkinum, sum hann vann seinasta dagin, traðkaði Høgni R. Øster enn einaferð upp á fimleikatindarnar*

### Oyggjaleikir í Hetlandi 2005

| | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| 1. Guernsey | 40 | 38 | 29 |
| 2. Isle of Man | 34 | 35 | 23 |
| 3. Jersey | 33 | 28 | 32 |
| 4. Bermuda | 16 | 16 | 14 |
| **5. FØROYAR** | **14** | **11** | **20** |
| 6. Gotland | 12 | 6 | 12 |
| 7. Hetland | 10 | 14 | 22 |
| 8. Cayman Island | 7 | 6 | 5 |
| 9. Gibraltar | 7 | 5 | 4 |
| 10. Isle of Wight | 4 | 6 | 14 |
| 11. Ynes Mon | 4 | 2 | 2 |
| 12. Áland | 3 | 8 | 6 |
| 13. Saaremaa | 3 | 3 | 1 |
| 14. Rhodos | 3 | 2 | 2 |
| 15. Orkney | 2 | 3 | 5 |
| 16. Sark | 1 | 3 | 1 |
| 17. Grønland | 1 | 2 | 3 |
| 18. Western Islands | 0 | 1 | 5 |
| 19. Alderney | 0 | 1 | 2 |
| 20. Falklandsoyggjarnar | 0 | 0 | 0 |
| 20. Frøya | 0 | 0 | 0 |
| 20. Hitra | 0 | 0 | 0 |
| 20. Prince Edward Island | 0 | 0 | 0 |
| 20. St. Helena | 0 | 0 | 0 |

Falklandsoyggjarnar, Frøya, Hitra, Prince Edward Island og St. Helena vunnu eingi heiðursmerki á Oyggjaleikunum í Hetlandi

### Føroyar á Oyggjaleikum

| | Gull | Silvur | Bronsa | Plasering |
|---|---|---|---|---|
| Isle of Man1985 | 0 | 2 | 1 | 10 |
| Guernsey 1987 | 1 | 2 | 5 | 10 |
| **Føroyar 1989** | **13** | **5** | **10** | **3** |
| Áland 1991 | 6 | 10 | 11 | 8 |
| Isle of Wight 1993 | 5 | 5 | 13 | 9 |
| Gibraltar 1995 | 10 | 14 | 15 | 6 |
| Jersey 1997 | 5 | 10 | 22 | 8 |
| Gotland 1999 | 7 | 12 | 9 | 9 |
| Isle of Man 2001 | 15 | 12 | 13 | 5 |
| Guernsey 2003 | 6 | 10 | 12 | 8 |
| Hetland 2005 | 14 | 11 | 20 | 5 |

### Føroysk heiðursmerki, býtt eftir ítróttargrein

| | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| Bogaskjóting | 6 | 1 | 2 |
| Fimleikur | 4 | 5 | 5 |
| Svimjing | 1 | 4 | 7 |
| Borðtennis | 1 | 0 | 3 |
| Flogbóltur | 1 | 0 | 1 |
| Fótbóltur | 1 | 0 | 0 |
| Badminton | 0 | 1 | 1 |
| Skjóting | 0 | 0 | 1 |
| Frælsur ítróttur | 0 | 0 | 0 |
| Súkkling | 0 | 0 | 0 |

## Føroysku heiðursmerkini í Hetlandi

### Gull

| | | |
|---|---|---|
| Bogaskjóting | Føroyar | Compund, head-to-head, lið |
| Bogaskjóting | Føroyar | FITA-runda, compound, lið |
| Bogaskjóting | Føroyar | FITA-runda, recurve, lið |
| Bogaskjóting | Føroyar | Recurve, head-to-head, lið |
| Bogaskjóting | Jógvan Niclasen | Compund, head-to-head, menn |
| Bogaskjóting | Jógvan Niclasen | FITA-runda, compound, menn |
| Borðtennis | Thomas Rasmussen | Einmansleikur, menn |
| Fimleikur | Føroyar | gólv, liðkapping, menn |
| Fimleikur | Helgi W. Olsen | Gólv, menn |
| Fimleikur | Helgi W. Olsen | Paralell-barra, menn |
| Fimleikur | Høgni R. Øster | Lop, bundin íðkan, menn |
| Flogbóltur | Føroyar | Kvinnur |
| Fótbóltur | Føroyar | Kvinnur |
| Svimjing | Føroyar | 4X50 metrar frí, kvinnur |

### Silvur

| | | |
|---|---|---|
| Badminton | Aksel Poulsen | Einmansleikur, menn |
| Bogaskjóting | Absalon Hansen | Recurve, head-to-head, menn |
| Fimleikur | Føroyar | Gólv og lop, liðkapping, menn |
| Fimleikur | Føroyar | Gólv, liðkapping, menn |
| Fimleikur | Helgi W. Olsen | Gólv og lop, einstaklingar í liðkappingini |
| Fimleikur | Helgi W. Olsen | Gólv, bundin íðkan, menn |
| Fimleikur | Høgni R. Øster | Barra, menn |
| Svimjing | Andrass Thomsen | 1500 metrar frí, menn |
| Svimjing | Andrass Thomsen | 400 metrar frí, menn |
| Svimjing | Elspa Mørkøre | 50 metrar rygg, kvinnur |
| Svimjing | Kristian Olsen | 50 metrar frí, menn |

### Bronsa

| | | |
|---|---|---|
| Badminton | Ragnar Rasmussen | Einmansleikur, menn |
| Bogaskjóting | Schandorff Vang | Compund, head-to-head, menn |
| Bogaskjóting | Sigrid K. Vang | FITA-runda, compound, kvinnur |
| Borðtennis | Føroyar | liðkapping |
| Borðtennis | Kjartan Eli Hentze | Einmansleikur, menn |
| Borðtennis | Kjartan Eli Hentze & Thomas Rasmussen | Tvímansleikur, menn |
| Fimleikur | Føroyar | Gólv og lop, liðkapping, kvinnur |
| Fimleikur | Føroyar | Gólv, liðkapping, kvinnur |
| Fimleikur | Føroyar | Lop, liðkapping, menn |
| Fimleikur | Helgi W. Olsen | Gólv og lop, bundin íðkan, menn |
| Fimleikur | Høgni R. Øster | Lop, menn |
| Flogbóltur | Føroyar | Menn |
| Skjóting | Marius Joensen | Skeet, einstaklingar |
| Svimjing | Elspa Mørkøre | 100 metrar rygg, kvinnur |
| Svimjing | Føroyar | 4X100 metrar frí, menn |
| Svimjing | Føroyar | 4X100 metrar, blandað, kvinnur |
| Svimjing | Føroyar | 4X50 metrar, blandað, kvinnur |
| Svimjing | Føroyar | 4X50 metrar, frí, menn |
| Svimjing | Jutta Thomsen | 800 metrar frí, kvinnur |
| Svimjing | Shaila millum Garðarnar | 50 metrar frí, kvinnur |